Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Ár 2011, hin 27. september 2011 kl. 17:30 hevði Klaksvíkar Býráð fund, har hesir limir møttu: Gunvá við Keldu, Jógvan Skorheim, Atli S. Justinussen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Óli M. Lassen, Auðunn Konráðsson, Signhild V. Joensen, Jákup F. N. Mikkelsen, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð og Jákup Skoradal, sum møtti fyri Hans Arna Bertholdsen.

2011/102.
11/00756 Skattafrælsi til felagið Hugni

Pensionistafelagið Hugni er felag í Klaksvík, sum hevur til endamáls at virka til frama fyri tey eldru og gomlu. Felagsskapurin hevur sent umsókn til TAKS, har søkt verður um at sleppa undan skattskyldu, og í hesum sambandi biður TAKS kommununa um at koma við áliti í málinum.
Feløg, grunnar v.m., hvørs viðtøkur siga, at inntøkan einans skal verða nýtt til alment góðgerin ella kirkjulig, manngóð, listarlig, vísindalig ella tílík endamál, kunnu eisini fáa fult ella partvíst skattafrælsi. Umsitingin metir, at virksemið hjá Pensionistafelagnum Hugni kemur undir hesar reglu (§3 í viðtøkunum). Sambært skattalógini eigur grunnurin annars at gjalda 49% í skatti, og av hesum eigur kommunan 38% og landskassin 62%.
Toll- og Skattaráð Føroya kann gera av, at persónar, feløg, grunnar v.m. fáa fult ella partvíst skattafrælsi, men **sambært §3 stk. 2 og 3 skal kommunan siga sína hugsan um málið**, áðrenn støða verður tikin, og hetta er orsøkin til, at aktuella mál verður lagt fyri býráðið.
Tilmæli:
Kommunan hevur einki at viðmerkja til umsókina hjá Pensionistfelagnum Hugni um skattafrælsi.
Sí annars skriv frá roknskaparleiðaranum í málinum, dagfest 30. juni 2011.

Fíggjarnevndin tók á fundi 21. sept. 2011 undir við tilmæli frá roknskaparleiðaranum, dagfest 30. juni 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/103.
11/00604 Skattafrælsi til Rumeniabussin

Sjálvsognarstovnurin Rumeniabussurin, við heimstaði í Klaksvík, hevur til endamáls at eiga buss, ið er latin sum gáva til nýtslu hjá Rumeniahjálpini v/Absalon Matras.
Stovnurin hevur sent umsókn til TAKS, har søkt verður um at sleppa undan skattskyldu, og í hesum sambandi biður TAKS kommununa um at koma við áliti í málinum.
Feløg, grunnar v.m., hvørs viðtøkur siga, at inntøkan einans skal verða nýtt til alment góðgerin ella kirkjulig, manngóð, listarlig, vísindalig ella tílík endamál, kunnu eisini fáa fult ella partvíst skattafrælsi. Umsitingin metir, at virksemið hjá Rumeniabussinum kemur undir hesa reglu (§ 2 í viðtøkunum).
Hetta er tó treytað av, at arbeiðið hjá Rumeniahjálpini er vælgerandi. Absalon Matras stendur fyri Rumeniahjálpini, sum hevur til endamáls at senda klæðir og annað til illa stødd í Rumenia og øðrum londum í eysturevropa. Absalon hevur seinastu árini gjørt einar 70 túrar busstúrar til Rumenia og har um leiðir, og tí kunnu vit ganga út frá, at hetta kemur undir hugtakið "vælgerandi arbeiði". Sambært skattalógini eigur grunnurin annars at gjald 49% í skatti, og av hesum eigur kommunan 38% og landskassin 62%.

Toll- og Skattaráð Føroya kann gera av, at persónar, feløg, grunnar v.m. fáa fult ella partvíst skattafrælsi, men **sambært §3 stk. 2 og 3 skal kommunan siga sína hugsan til málið**, áðrenn støða verður tikin, og hetta er orsøkin til, at aktuella mál verður lagt fyri býráðið.
Tilmæli:
Klaksvíkar Kommuna hevur einki at viðmerkja til umsókina hjá Sjálvsognarstovninum Rumenia-bussurin um skattafrælsi.
Sí annars skriv frá roknskaparleiðaranum í málinum, dagfest 8. sept. 2011.

Fíggjarnevndin tók á fundi 21. sept. 2011 undir við tilmæli frá roknskaparleiðaranum, dagfest 8. sept. 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/104.
10/00207 Sjálvsognarstovnurin Spinnaríið – stovning, viðtøkur v.m.

Eftir at býráðið við býráðssamtyktum 24. mai og 21. juni 2011, setti á stovn Sjálvsognarstovnin Spinnaríið, hava partarnir, sum manna nevndina samskift um málið, og er komið fram til semju um lutvísa broyting av nevndarsamansetingini, sum við hesum verður lagt fyri býráðið til endaliga støðu-takan. Sí tilfar í málinum.

Mælt verður til, at §5 í viðtøkunum verður broytt, soleiðis at nevndin verður mannað soleiðis:

- Klaksvíkar Handverkarafelag velur ein lim
- Ferðavinnan í Norðoyggjum velur ein lim
- Klaksvíkar Kommuna velur ein lim

Haraftrat fáa báðir leigararnir í húsinum hvør sín lim í nevndina, galdandi í 2 ár fram, tá ið nevndar-sessirnir fella burtur:

- Knitting Faroes sp/f velur ein lim
- Bátafelagið velur ein lim

Nøvnini á limunum, sum omanfyri nevndu feløg og kommunan velja, verða staðfest á býráðsfundinum

Býráðsins samtykt:

Tilmælið samtykt og staðfest, at omanfyri nevndu partar hava velja niðanfyri standandi umboð í nevndina fyri sjálvsognarstovnin:

Klaksvíkar Handverkarafelag:	**Rúni Heinesen,**
Ferðavinnan í Norðoyggjum:	(Ferðavinnan kemur við navninum seinni)**,**
Klaksvíkar Kommuna:	**Eyðbjørn Poulsen,**
Knitting Faroes sp/f:	**Olga Biskopstø,**
Bátafelagið:	**Ólavur Ólason Poulsen.**

2011/105.
08/00135 Val av limi í Barnaverndarnevndina fyri Marjun Klakkstein

Marjun Klakstein hevur boðað frá, at hon ynskir at verða loyst frá nevndarsessinum í Barnaverndarnevndini. Málið verður tí lagt fyri býráðið til tess at velja ein lim í nevndina í hennara stað, galdandi hetta valskeiðið út.
Málið var fyri á býráðsfundinum 21. juni 2011, har tað varð útsett, og verður nú lagt fyri býráðið aftur.

Býráðsins samtykt:
Jacqueline Gardar

2011/106.
08/00135 Val av limi í valstýrið fyri atkvøðuøkið Mikladalur/Trøllanes 2011-2012

Veljast skal ein limur í valstýrið fyri atkvøðuøkið Mikladalur/Trøllanes, galdandi fyri restina av inniverandi býráðsvalskeiði.

Býráðsins samtykt:
Staðfest, at hesir limir manna valstýrið:
Jógvan Joensen, Trøllanes
Herfrí Sørensen, Mikladalur
Jóan Hendrik Hendriksen, Mikladalur

2011/107.
08/00135 Val av limum í valstýrið fyri atkvøðuøkið Svínoy 2011-2012

Veljast skulu limir í valstýrið fyri atkvøðuøkið Svínoy, galdandi fyri restina av inniverandi býráðsvalskeiði.

Býráðsins samtykt:

Samtykt at velja hesar limir í valstýrið:
Regin Justinussen, Svínoy
Hanna Jacobsen, Svínoy
Petur Danielsen, Svínoy

Varalimir:
Fróði Thomassen, Svínoy
Óli á Geilini, Svínoy

2011/108.
11/00706 Matrikulering í samband við Skúlan við Ósánna

Nú Skúlin við Ósánna er bygdur av nýggjum, krevja brunamyndugleikarnir, at grundøkið, sum liggur í fleiri matriklum, verður samanlagt. Tekniska Umsiting mælir til, at samanlegging verður framd, sum

vístí kortskjali í málinum (reyða linjan vísir markið runt samlaða grundøkið). Kostnaður at gjalda til Umhvørvisstovuna: uml. kr. 4000,- sum verður at bera av verkætlanini. Sí skriv frá TU 29. aug. 2011.

Á fundi 13. september 2011 tók Tekniska Nevnd undir við skrivinum frá TU, dagf. 29. august 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/109.
11/00710 Byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 253v

Eigarin av matr. nr. 253v søkir um loyvi til at byggja bilhús 0,5 metar frá vegnum í mun til loyvda 1 metur, sum byggisamtyktin loyvir. Umsøkjarin hevur áður søkt um loyvi til at byggja niðan til bakkantin av gongubreyt, men fekk ikki loyvi. Síðani er hann byrjaður at byggja í summarferiuni og er steðgaður av kommununi tann 25. august 2011.
Rættarstøði:
3. gr. Byggilinjur.
Sambært kortskjali 1 tilhoyrandi hesa samtykt.
1. Byggilinjur framvið veg
a) Íbúðarvegir: Byggilinjan verður her sett til 3 metrar frá gongubreyt, tó verður, har umstøðurnar loyva tí, givið loyvi til, at bilhús kunnu byggjast 1 metur frá bakkanti gongubreyt, um bygt verður soleiðis, at bilhúsið vendir við tí longru síðuni móti vegi, og at útkoyringin ikki vendir út móti vegnum.
Tilráðing
Býarskipanrbólkurin mælir til at reglurnar í pkt. 1, a) kunnu broytast á henda hátt:
a) Íbúðarvegir:
*Byggilinjan verður her sett til 3 metrar frá gongubreyt, tó verður, har umstøðurnar loyva tí, givið loyvi til, at bilhús kunnu byggjast ~~1~~ **1/2** metur frá bakkanti gongubreyt, um bygt verður soleiðis, at bilhúsið vendir við tí longru síðuni móti vegi, og at útkoyringin ikki vendir út móti vegnum.* ***Eingin partur av bilhúsinum (úthang og takrenna) skal koma út um vegmark. Regnvatn og kavi skal vera hildi inni á egnari grund.***
Mælt verður til at geva frávik út frá omanfyri nevndu broyting.

Á fundi 13. september 2011 tók Tekniska Nevnd undir við tilmæli frá TU dagf. 9. september 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/110.
11/00056 Isenkram – Umbygging

Frágreiðing um málið
Víst verður til áður gjørda frágreiðing um málið, dagfest 29. nov. 2010, har biðið var um í 450 til 500 túsund krónur til umvæling av Isenkram í 2011.
Vegadeild kommununnar hevur framt arbeiðið, men vegna serligar umstøður, sum gjørdust kendar undir byggingini, eydnaðist ikki at halda seg undir metta kostnaðin í fyrsta partinum av umvælingar-ætlanini. Hesi viðurskifti vóru millum onnur vánaligur standur av útsíðum og ein gomul innrætting (frystiskáp), sum var sera trupul at burturbeina.

Kostnaðurin av fyrsta parti av íløguarbeiðnum gjørdist 550 túsund krónur. T.v.s. einar 100 túsund krónur omanfyri samlaðu játtanina í 2011.
Í 2010 varð eitt bráfeingis rakstrararbeiði samtykt, sum fevndi um at skifta ein part av tekjuni á Isenkram. Mettur kostnaður var 100 túsund krónur. Vegna vánaligt veður eydnaðist ongantíð at fremja hetta arbeiði í 2010. Arbeiðið varð tí framt í vár, og saman við øðrum neyðugum rakstrararbeiðum í Isenkram gjørdist kostnaðurin samanlagt einar 150 túsund krónur.
Tilmæli:
Vísandi til serligu umstøðurnar, nevndar omanfyri, verður mælt viðkomandi nevndum og býráði til at staðfesta meirnýtsluna.
Fígging
Málið viðførir eitt yvirtrekk á fíggjarætlan kommununnar fyri 2011, áljóðandi 250 túsund krónur.

Á fundi 13. sept. 2011 vísir Tekniska Nevnd á, at tað er óheppið við so stórum yvirtrekki, men mælir til at fíggja meirnýtsluna uppá 250 túsund krónur av endurgjaldinum fyri oljudálkingina.

Mentanarnevndin tekur á fundi 14. sept. 2011 undir við TN, 13.09.2011.

Fíggjarnevndin tók á fundi 21. sept. 2011 undir við TN og MeN.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/111.
10/01006 Sløkkiliðið – ynski um keyp des. 2010

Tann 25. januar 2011 samtykti býráðið við 2. viðgerð, at játta Sløkkiliðnum kr. 600.000,- til ymiskar íløgur, í samband við málið um oljudálkingina á Klaksvík tann 17. apríl 2010. Samtykt er, at málið kann fremjast, tá ið peningurin er innkomin.
Undir viðgerðini av málinum var støddin á endurgjaldinum fyri oljudálkingina 2,3 mió. kr.. Síðani er semja gjørd millum tryggingarfelag og kommununa um eina endurgjaldsupphædd uppá 1,7 mió. kr.
Tilmæli:
Vísandi til tørvin hjá Sløkkiliðnum verður við hesum mælt til at halda fast við samtyktina tann 25. januar 2011. Sí skriv frá TU 9. september 2011.

Tekniska Nevnd tók á fundi 13. sept. 2011 undir við tilmæli frá TU dagf. 9. September 2011.

Á fundi 21. sept. 2011 tók Fíggjarnevndin undir við TN.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.
Elsebeth M. Gunnleygsdóttur luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.

2011/112.
11/00477 Avseting til list av allari nýbygging

Mælt verður býráðnum til, umvegis Fíggjarnevndina, at góðkenna reglugerð fyri listarligt prýði, sí skriv frá Mentanardeildini, dagfest 4. sept. 2011.

Heilsu- og Umhvørvissnevndin mælti á fundi 12. sept. 2011 til, at játtanin til list verður viðgjørd frá máli til mál, men at listin verður tikin upp í samband við hvørja einstaka verkætlan.

Á fundi í Byggi- og Býarskipanarnevndini 12. sept. 2011 boðaði ein minniluti, Signhild Joensen og Elsebeth M. Gunnleygsdóttir, frá, at tær taka støðu í býráðnum.
Ein annar minniluti, Auðunn Konraðsson og Óli M. Lassen, mælir til, at peningur verður settur av í hvørjari einstakari nýbygging.

Á fundi 13. sept. 2011 mælti meiriluti í Havna- og Vinnunevndini, Hans Arne Bertholdsen, Auðunn Konráðsson og Óli M. Lassen tekur undir við viðtøku hjá HeiN dagfest 12. september 2011.
Ein minniluti, Steinbjørn O. Jacobsen og Atli S. Justinussen, tekur undir við tilmæli frá mentanarleiðaranum dagf. 4. september 2011 um, at peningur verður settur av til list í allari nýbygging.

Á fundi 13. sept. 2011 í Teknisku Nevnd tók ein meiriluti, Hans Arne Bertholdsen, Auðunn Konráðsson og Óli M. Lassen, undir við meirilutanum í Havna- og Vinnunevndini 13. sept. 2011.
Ein minniluti, Óluva Klettskarð, tekur undir við tilmæli frá mentanarleiðaranum 4. September 2011.
Ein annar minniluti, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, tekur støðu í býráðnum.

Á fundi 14. sept. 2011 í Sosialu Nevnd tekur ein minniluti, Steinbjørn O. Jacobsen og Atli S. Justinussen, undir við minnilutanum í Havna- og Vinnunevndini.
Ein minniluti, Jákup Mikkelsen og Auðunn Konraðsson,tekur undir við Heilsu- og Umhvørvisnevndini.
Ein annar minniluti tekur støðu í býráðnum.

Á fundi 14. sept. 2011 í Mentanarnevndini tók ein minniluti, Atli S. Justinussen, undir við minnilutanum í Havna- og Vinnunevndini.
Ein annar minniluti, Jákup F. N. Mikkelsen, tekur undir við Heilsu- og Umhvørvisnevndini.
Ein annar minniluti, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, tekur støðu í býráðnum.

Á fundi 15. sept. 2011 tók Ferðslunevndin við tilmælinum frá Havna- og Vinnunevndini.

Á fundi 21. sept. 2011 í Fíggjarnevndini tók ein minniluti í nevndini, Auðunn Konráðsson, undir við HeiUN, minnilutanum í BBN, meirilutanum í HaVN, meirilutanum í TN og einum minniluta í SoN.
Ein annar minniluti, Gunvá við Keldu og Steinbjørn O. Jacobsen, taka undir við tilmælinum frá Mentanardeildini.
Ein triði minniluti, Signhild V. Joensen og Jógvan Skorheim, tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá Mentanardeildini samtykt við 8 atkvøðum fyri og 3 ímóti (Auðunn Konráðsson, Óli M. Lassen og Jákup F. N. Mikkelsen).

2011/113.
<u>2006-12-038 Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku – møguligt víðari byggistig</u>

Víst verður til býráðssamtykt tann 27. juni 2006, har samtykt var, at stovnurin skal arbeiða fram ímóti at fremja 2. og 3. byggistig av verkætlanini.

Nevndin fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku hevur á fundi tann 28. mars 2011 samtykt at heita á umsitingina um at taka málið framaftur og fyrireika málið at leggja fyri býráðið.
Umsitingin arbeiðir við at fyrireika málið og hevur fingið eina kostnaðarmeting av 2. og 3. byggistigi, áljóðandi kr. 32,4 mill.kr.
Eisini hevur umsitingin vent sær til fíggjarstovnarnar við fyrispurningi um fígging av verkætlanini.
Málið verður lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð til umrøðu og við tilmæli um at taka undir við samtyktini frá 27. juni 2006.

Sosiala Nevnd tók á fundi 14. sept. 2011 undir við ætlanum um at fara undir við 2. og 3. byggistig.
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 9. september 2011.

Fíggjarnevndin tók á fundi 21. sept. 2011 undir við SoN.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/114.
2006-19-075 Samstarv um verkætlanina "Gamligarður"

Málið byrjar við, at Svínoyar Kommuna søkti um og fekk eina treytaða tilsøgn um studningslán til bygging av einum eldrasambýli til 8 búfólk og eina tilhoyrandi treytaða tilsøgn um fígging av rakstrinum av heiminum eftir treytum.
Sambært fundarfrásøgn hjá AMR varð m.a. avrátt millum Svínoyar Kommunu og AHR, at kommunan skuldi venda sær til aðrar kommunur í Norðoyggjum við fyrispurningi um samstarv um verkætlanina, og er tað í tí sambandi, at málið verður viðgjørt her í kommununi – sí skriv frá umsitingini, dagfest 6. sept. 2006.
Við hesum verður málið lagt fyri politiska mynduleikan til viðgerðar og støðutakan til, hvørt arbeiðast skal víðari við málinum.
Sí skriv frá umsitingini, dagfest 19. juli 2011, har greitt verður nærri frá gongini í málinum.

Sosiala Nevnd hevði fund 14. sept. 2011, har ein meiriluti, Steinbjørn O. Jacobsen, Jákup Mikkelsen og Atli S. Justinussen, mælir til at fara í gongd við byggingina av sambýlinum í Svínoy beinanvegin.
Ein minniluti, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur og Auðunn Konraðsson, mælir til at bíða, til svar kemur frá Almannamálaráðnum um tørvin av sambýli í Svínoy.

Fíggjarnevndin hevði fund 21. sept. 2011, har ein meiriluti í nevndini, Gunvá við Keldu, Jógvan Skorheim, Auðunn Konráðsson og Signhild V. Joensen, tekur undir við minnilutanum í SoN 14. sept. 2011.
Ein minniluti í nevndini, Steinbjørn O. Jacobsen, tekur undir við meirilutanum í SoN 14. sept. 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá meirilutanum í Sosialu Nevnd og minnilutanum í Fíggjarnevndini varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jákup Skoradal, Óluva Klettskarð, Steinbjørn O. Jacobsen, Jákup F. N. Mikkelsen, Signhild V. Joensen og Atli S. Justinussen) og 4 ímóti (Gunvá við Keldu, Jógvan Skorheim, Óli M. Lassen og Auðunn Konráðsson). Elsebeth M. Gunnleygsdóttur atkvøddi ikki.

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

2011/115.
11/00757 Frítíðarskúlin og Mylnuhúsið – meirnýtsla 2011

Nú frítíðarskúlin verður fluttur frá Mylnuhúsinum til eina deild fyri seg, er neyðugt at útvega nýggju deildini 790 tkr. netto til fígging av virkseminum august-desember 2011.
Mælt verður til, at upphæddin verður fingin til vega við at flyta ávíkavist 605 tkr. frá Mylnuhúsinum og 185 tkr. frá Barnaansing felags til nýggju deildina. Av tí at kostnaðurin av at reka frítíðarskúlan verður fíggjað við flyting millum kontur, hevur málið ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa.

Á fundi 14. sept. 2011 tók Sosiala Nevnd undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 8. sept. 2011.

Á fundi 21. sept. 2011 tók Fíggjarnevndin undir við SoN

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/116.
11/00026 Skipan av frítíðarskúla – eykajáttan 2011 *– 1. viðgerð*

Sum íløga til umbyggingina av hølum til frítíðarskúlan varð játtað 1 mió.kr. Kostnaðarmeting, sum gjørd, áðrenn arbeiðið byrjaði, var áljóðandi 910.669,- kr.
Verkætlanin hevur undir arbeiðnum rent seg í nøkur óvæntað viðurskifti, sum hava meirkostnað við sær. Eitt nú var neyðugt við nýggjum ketli og oljufýring, sum fór at leka, tá ið tendrað varð aftur, eftir at hava staðið sløkt í 2-3 mðr. Hesi tól eru frá 80unum og høvdu helst gingið fyri innan leingi hóast alt. Harumframt hevur verið neyðugt at gera bæði eyka El- og HVS-arbeiði, tí standurin var verri, enn upprunaliga mett.
Sambært fyribils kostnaðaryvirliti, dagfest 6. september 2011, er mettur kostnaður uppgraderaður til 1.280.088,-. Sí kostnaðaryvirlit og skriv í málinum, dagfest 8. september 2011.
Tilmæli:
Vísandi til fyribils kostnaðaryvirlit dagf. 06-09-2011, verður umbøn um meirjáttan á 325.000,- kr løgd fyri SoN-FíN og BýR til viðgerðar og støðutakan

Sosiala nevnd tók á fundi 14. sept. 2011 undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 8. september 2011.

Fíggjarnevndin tók á fundi 21. sept. 2011 undir við SoN.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/117.
11/00761 Barnaverndartænastan – meirnýtsla 2011 og umsókn um eykajáttan *– 1. viðgerð*

Í skrivi frá Barnaverndartænastuni, dagf. 26. juli 2011, verður greitt frá, at við verandi virksemi verður hall í fíggjarætlanini hjá Barnaverndartænastuni, áljóðandi 2,5 mió. kr. í inniverandi ári. Viðvíkjandi orsøkunum til hallið verður víst til frágreiðing í omanfyrinevnda skrivið. Málið verður lagt fyri nevnd til umrøðu og støðutakan.

Sosiala Nevnd staðfesti á fundi 14. sept. 2011 meirnýtsluna og mælir til eina eykajáttan.

Á fundi 21. sept. 2011 tók Fíggjarnevndin undir við SoN og við arbeiðnum hjá umsitingini at tálma útreiðsluvøksturin á økinum, og at uppfylgjandi viðgerð av hesum verður í komandi fundarumfari.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/118.
11/00290 Møgulig bussleið í Klaksvíkar Kommunu

Í skrivi, dagfest 16. mars 2011, setti Steinbjørn O. Jacobsen, býráðslimur, fram uppskot um keyp av brúktum bussum til eina royndarskipan við bussleið í kommununi. Sí skriv frá umsitingini, dagfest 13. september 2011, har greitt verður innleiðandi frá málinum.
Grundleggjandi kann sigast, at eingin avseting er beinleiðis til hetta í 2011, so útgangsstøði kommununnar er, at neyðuga upphæddin má setast av á fíggjarætlan býráðsins.
Hinvegin eru í inniverandi ári niðanfyri standandi játtanir á fíggjarætlan kommununnar til málsøkið fólkaflutningur:

Serflutningsskipanin	Kr.	238.000,-
Farleiðir (Bussleið 410)	Kr.	580.000,-
Skúlin felags, flutningur (skúlanæmingar)	Kr.	210.000,-
SAMANLAGT	Kr.	1.028.000,-

Sambært upplýsingum frá øðrum kommunum kann vegleiðandi roknast við, at ein fult útbygd bussleið árliga kostar umleið eitt skattaprosent at reka. Hetta skal eyðvitað bert takast sum ein leyslig meting, ið sjálvandi krevur at kannast nærri. Hinvegin eigur tað eisini at bera til at gera munandi ódýrari, avmarkaðar royndarskipanir, og tað er hetta, sum uppskotsstillarin leggur upp til.
Vísandi til hjálagda uppskot og omanfyri standandi viðmerkingar verður biðið um nevndarinnar støðutakan til, hvørt hetta er eitt mál, ið umsitingin skal kanna nærri.

Á fundi 13. september 2011 í Teknisku Nevnd mælti ein meiriluti, Óluva Klettskarð, Óli M. Lassen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur og Auðunn Konráðsson, til, at umsitingin kannar eina bíliga bussleið. Ein minniluti, Hans Arne Bertholdsen, mælir frá at brúka orku og pening uppá málið.

Fíggjarnevndin tók á fundi 21. september 2011 undir við meirilutanum TN.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá meirilutanum í Teknisku Nevnd og Fíggjarnevndini samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

2011/119.
11/00341 Fíggjarætlan 2012
Á eykafundi í Fíggjarnevndini 20. september 2011 møttu Jancy B. Klein, sosialdeildarleiðari, og Heri M. Hammer, býarverkfrøðingur, til fyrsta partin av fundinum, har tey greiddu frá teirra málsøkjum og frá samtyktum um nýggj tiltøk og tænastur innan hesi, sum tí krevja at takast við í viðgerðina av fíggjarætlanini.

Nevndin gjøgnumgekk og umrøddi síðan fíggjarætlanartølini á teimum ymisku málsøkjunum. Nevndin samtykti síðan hendan yvirkipaða karmin fyri fíggjarætlan at leggja fyri býráðið, sum síðan beinir málið aftur í nevndirnar at útgreina endaliga innan fyri samtykta fíggjarkarmin:

Skattainntøkur				140,0 mkr.
Rakstrarútreiðslur:	Játtan 2011	Broyting	Játtan 2012	
Fyrisiting	13,5 mkr.	+1,0 mkr.	14,5 mkr.	
Sosiala økið	41,3 mkr.	+1,2 mkr.	42,5 mkr.	
Mentanarøkið	16,4 mkr.	+1,5 mkr.	17,9 mkr.	
Tekniska Økið	23,6 mkr.	+2,3 mkr.	25,9 mkr.	
Havnaøkið	–3,5 mkr.	+1,5 mkr.	–2,0 mkr.	
	=91,3 mkr.	+7,5 mkr.	=98,8 mkr.	–98,8 mkr.
=Avlop til rentur, avdráttir og íløgur:				41,2 mkr.
Rentur				–8,2 mkr.
= Avlop til avdráttir og íløgur:				33,0 mkr.
Avdráttir				–5,0 mkr.
= Avlop til íløgur:				28,0 mkr.
Íløgur				–28,0 mkr.
=Úrslit				0,0 mkr.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt, tó broytt, sum ásett í broytingaruppskoti frá nevndarformonnunum, dagfest 27. september 2011.

2011/120.
11/00523 Skrivstovuhjálp til Mentanardeildina – *2. viðgerð*

Leiðarin á Mentanardeildini heitir í skrivi dagfest 1. juni 2011 á Mentanarnevndina um at skipa so fyri, at skrivstovufólk kann setast á Mentanardeildini - í fyrstu atløgu møguliga gjøgnum ALS-skipanina, og í aðru atløgu at lýsa eftir fólki at byrja 1. januar 2012.

Mentanarnevndin tekur á fundi 8. juni 2011 undir við pkt. 1 í skrivinum frá deildarleiðaranum, dagfest 1. juni 2011.

Fíggjarnevndin tekur undir við Mentanarnevndini 8. juni 2011, tó við tí broyting, at pkt. 2 í tilmælinum verður tikið upp til viðgerðar í sambandi við fíggjarætlanarviðgerðina 2012, og mælir nevndin til, sum eina royndarskipan hetta árið út, at setanarøki fulltrúans á Sosialu Deild verður víðkað til eisini at fevna um borgarstjóran, kommunustjóran og Mentanardeildina.

Á býráðsfundinum 21. juni 2011 samtykti býráðið tilmælið við fyrru samtykt, og verður málið við hesum lagt fyri býráðið til seinnu samtykt.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/121.
2007-03-016 Magnstøðin – Lendisviðurskifti – *2. viðgerð*

Víst verður til skriv frá Teknisku Umsiting dagfest 3. juni 2011, har mælt verður frá, at Kommunan rindar fyri asfaltering av økinum niðanfyri Magn-støðina, tí peningur er ikki tøkur á fíggjarætlanini fyri 2011 til nevnda arbeiði. Málið fær bert fíggjaligar avleiðingar, um so verður, at tikið verður av tilboðnum frá Magn, um at teir leggja peningin út fyri asfaltering, og at mótroknað verður í leiguni. Inntøkan hjá Klaksvíkar Havn fyrsta ársfjórðing leggur heldur ikki upp til, at mótroknað verður í leigugjaldinum.

Havna- og Vinnunevndin er á fundi 7. juni 2011 samd um at seta neyðugan peningin av á fíggjarætlanina fyri 2012 til asfalteringina á Magn, soleiðis at arbeiðið kann fremjast í januar 2012.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 7. juni 2011 undir við tilmæli hjá Havna- og Vinnunevndini, dagf. 7. juni 2011.

Fíggjarnevndin beinir á fundi 15. juni 2011 málið í býráðið.

Á býráðsfundinum 21. juni 2011 samtykti býráðið niðanfyristandandi við fyrru samtykt: Broytingaruppskot – um at arbeiðið verður framt sambært tilboði frá HJ Asfalt, áljóðandi kr. 61.750,- uttan mvg, og fíggjað av játtanini til viðlíkahald havnir (konta 165200), og upphæddin verður tikin upp í sambandi við reguleringina av játtanini til Klaksvíkar Havn í september, og at leigusáttmálin verður tillagaður – varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 0 ímóti. Signhild V. Joensen atkvøddi ikki.

Málið verður við hesum lagt fyri býráðið til seinnu samtykt.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt við 10 atkvøðum fyri og 1 ímóti (Signhild V. Joensen).

2011/122.
<u>09/00963 Ábøtur á Vevskúlan –</u> *<u>2. viðgerð</u>*

Í skrivi dagfest 2. juni 2011 frá umsitingini verður mælt til, at írestandi peningurin at gjalda arbeiðið, ið Viktor Olsen hevur gjørt, verður tikin av "Stadionøkið". Víst verður annars til tilmælið.

Mentanarnevndin tók á fundi 8. juni 2011 undir við tilmæli 2. juni 2011 men mælir til, at írestandi peningurin fyri rokning frá Viktor Olsen verður játtaður av "Klaksvíkar Søgu".

Fíggjarnevndin tók á fundi 15. juni 2011 undir við Mentanarnevndini 8. juni 2011.

Á býráðsfundinum 21. juni 2011 samtykti býráðið tilmælið við fyrru samtykt, og verður málið við hesum lagt fyri býráðið til seinnu samtykt.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/123.
<u>11/00227 Regulering av fíggjarætlan 2011, Klaksvíkar Havn</u> *<u>– 2. viðgerð</u>*

Í skrivi frá Teknisku Umsiting, dagfest 3. juni 2011 verður víst til málið um Kósakeiina, har semja er um at broyta tilmæltu fíggjarligu útgreiningina av íløgujáttanini og umvælingarkontoini, sum bleiv løgd fyri seinasta nevndarumfar. Mælt verður til, at inntøkan frá Smyril-Line, kr. 170.000, verður inntøkuførd í ár, og peningurin nýttur til Kósakaiina.
Málið krevur í fyrstu atløgu, at rakstrarsíðan av fíggjarætlanini fyri 2011 hækkar við 170 túsund krónum. Harafturat kann roknast við einari umbøn um eykajáttan til raksturin hjá Klaksvíkar Havn eftir summarfrítíðina í 2011.

Havna- og Vinnunevndin tekur á fundi 7. juni 2011undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting dagf. 3. juni 2011.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 15. juni 2011 undir við Havna- og Vinnunevndini 7. juni 2011.

Á býráðsfundinum 21. juni 2011 samtykti býráðið tilmælið við fyrru samtykt, og verður málið við hesum lagt fyri býráðið til seinnu samtykt.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.